# Orkestur fyri øll



*Ovasta røddin í Havnar Hornorkestur, formaðurin Kári Olsen, heldur støðuna hjá orkestrinum vera góða, og nógv er í væntu*

**– Í Havnar Hornorkestri kunnu øll vera við, sum duga at spæla og lesa nótar. Og tað er nógv torførari at fara burturúr, enn tað er at koma uppí, sigur Kári Olsen, formaður fyri Havnar Hornorkestur**

PRÀT
*Heri á Rógvi/*
*Finnur Justinussen*

Formaðurin í Havnar Hornorkestri eitur í dag Kári Olsen, og hann hevur verið limur í orkestrinum í næstan tretivu ár. Aftanfyri seg hevur hann og fleiri av eldri limunum eina rúgvu av konsertum, uttanlandsferðum og ikki minst venjingartímum.

Hann letur væl at støðuni hjá aldargamla hornorkestrinum.

– Í Havnar Orkestri kunnu øll vera við, sum duga at spæla og lesa nótar og kenna seg trygg við at spæla saman við øðrum í einum felagsskapi, sigur Kári Olsen.

Tilgongdin til Havnar Hornorkestur kemur frá Musikskúlanum í høvuðsstaðnum. Kári Olsen sigur, at Musikskúlin ger eitt stórt og munagott arbeiði, sum gagnar Havnar Hornorkestri nógv.

Tilgongdin hevur verið góð seinnu árini – bæði hvat viðvíkjur fólki og støði, heldur Kári. Upplæringina hava spælararnir fingið úr Musikskúlanum, so tað er ikki neyðugt í orkestrinum.

Skulu vit trúgva Kára Olsen, so er tað ikki bara sum at siga tað at halda uppat í Havnar Hornorkestri.

– Tað er nógv torførari at fara burturúr, enn tað er at koma uppí. Tað er stuttligt at spæla, og tað er kanska heldur ikki so lætt at finna nýggjar leikarar, sigur Kári Olsen.

Við hundrað árum á baki hevur orkestrið eisini savnað sær nakrar fastar tættir.

– Vit hava skipað fyri nógvum tiltøkum sjálvi, og vit hava eisini onkrar traditiónir, m.a. ein tann elsta traditiónin, sum er Føroyum í dag – at spæla í kirkjuni á jólum. Tey vita ikki reiðiliga, nær hetta er byrjað, men í nógv, nógv ár hevur hetta verið fastur táttur, sigur Kári Olsen.

Aldursforsetin í Havnar Hornorkestri í løtuni er Brynjálvur Mikkelsen, sum í løtuni upplivir sekstiárini fyri aðru ferð síðani sekstiárini.

Havnar Hornorkestur telur vanliga tretivu leikarar, og tey tvær ferðir um vikun at venja saman.

### Bakar Hansen

Skulu vit nerta eitt sindur við søguna og upprunan til Havnar Hornorkestur, so er upphavsmaðurin meira enn nakar annar Bakar Hansen.

– Tað er Bakar Hansen fyri at takka, at vit Havnar Hornorkestur varð sett á stovn. Hann dugdi at undirvísa, og hann spældi øll ljóðføri sjálvir. Hann vildi hava næmingar, og so við øktist áhugin fyri at spæla millum manna.

Í 1903 varð Thorshavns Musikforening sett á stovn við nøkrum fáum leikarum, sigur Kári Olsen.

Síðani tá er nógv, m.a. navnið. Havnar Hornorkestur hevur millum manna verið rópt fyri hetta at kalla alla sína tíð, men formella navnið hevur verið eitt sindur ymiskt millum ár og dag, men tey nógvu seinnu árini hevur navnið verið bara verið Havnar Hornorkestur.

Orkestrið fekk og hevur enn bretskt snið, og fleiri ferðir hava bretar verið á vitjan fyri at stjórna kórinum.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fingið hendur á talinum av leikarum, sum hava spælt í orkestrinum tey hundrað árini, men hetta tal má vera nakað høgt, tí eitt sindur av útskifting er ikki at sleppa uttanum.

# Føðingardagur í stórum stíli



*Tvær ferðir um vikuna hittast tey í hornorkestrinum til venjingar. Leygardagin fingu tey so møguleikan at vísa, hvat er komið burturúr*



*Ungi og evnaríki trombone spælarin Dávur Juul Magnussen*

**Havnar Hornorkestur helt um vikuskiftið 100 ára føðingardag so tað sang eftirí**

FØÐINGARDAGUR
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Finnur Justinussen*

Havnar Hornorkestur hátíðarhelt um vikuskiftið 100 ára føðingardagin við stórari konsert í Norðurlandahúsinum.

Sjálvur dagurin er kortini ikki fyrr enn í dag – hósdagin. Dagurin hevur verið hildin á ymsan hátt. Konsertin í Norðurlandahúsinum var størsta almenna tiltakið. Spælt var fyri at kalla fullum húsi, og hetta er sjálsamt í tílíkum høpi, sigur formaðurin, Kári Olsen.

Leygarkvøldið var eisini ein veitsla fyri innbodnum, har eini hundrað fólk luttóku. Í føðingardagsárinum hevur orkestrið havt tvey onnur tiltøk: Eitt skotskt orkestur var á vitjan í september mánað; síðst í november spældi Havnar Hornorkestur fyri eysturoyingum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

30 leikarar manna vanliga Havnar Hornorkestur, men á konsertini vóru 32. Umframt tónleikararnar var mæti tónleikarin John Wallace eisini við á konsertini Unga føroyska stórtalentið Dávur Juul Magnussen var eisini solistur. Dávur Juul Magnussen spælir trombone, og hann hevur vunnið sær heiður í kappingum uttanlands.

Fleiri av leikarunum høvdu fingið sær eitt sindur av bláum liti í hári. Eitt frískligt stig, hóast kombinatiónin við gráum og bláum ikki rættiliga kom til sjóndar.

Skráin leygarkvøldið var blandað við mest av løttum horntónleiki. Millum annað var onkur marsjur var á skránni, eitt sindur av kendum løgum fyri hornorkestur og eisini Òlavur Riddararós og Stígum Fast vóru arrangerað til hornorkestur hetta kvøldið.

Vit skulu ikki her fara at siga, hvat støðið á konsertini var, men áhoyrararnir og tónleikararnir lótu væl at, og tað taka vit so eisini undir við.



*Dirigenturin í Havnar Hornorkestri hevur verið tann sami tey nógvu seinnu árini – Ove Olsen. Hann stóð sjálvsagt á odda fyri orkestrinum á konsertini leygardagin*

### Gávur

Sum vera man til eitt tílikt fekk Havnar Hornorkestur eisini onkra gávu og heilsanir.

Frásøgumaðurin hetta kvøldið, Heini Davidsen, bar fram heilsur frá m.a. Ova Carlsen, fyrrverandi leikara í Havnar Hornorkestur. Fleiri av fyrrverandi limunum í orkestrinum vóru eisini at síggja í Norðurlandahúsinum.

Tórshavnar Kommuna hevur givið Havnar Hornorkestri fleiri gávur. Fyri uttan at stuðla í sambandi við nýggjasta innkeypið, so hevur kommunan eisini latið Íslagrið ella Íshúsið til venjingarhøli hjá orkestrinum. Áður hevur Havnar Hornorkestur vant á Skansanum. Farast skal undir at innrætta hølini, og til hetta endamálið fekk orkestrið 75.000 kr. frá kommununi.

Men størstu gávuna á 100 ára degnum hevur Havnar Hornorkestur givið sær sjálvum við góðum fíggjarligum stuðuli fleiristaðni frá.

Fyri kortum fekk orkestrið spildurnýggj ljóðføri, og hesi eru kostnaðarmikil at fáa hendur á, men tað er stríðið vert, haldi øll í Havnar Hornorkestri.

Sostatt skuldi grundarlag verið fyri, at tey ungu og eldri spælandi møta nýggjum tíðum og avbjóðingum.

Vit fara mestur at hoyra nógv og meira til bláu hornspælararnar úr Havn.

*Andras Olsen spældi við Havnar Hornorkestri leygardagin við einum av teimum nýggju skínandi ljóðførunum*

# Eitt gott høvi



*Víðagitni skotski tónleikarin John Wallace setti sín serstaka dám á konsertina hjá Havnar Hornorkestri leygardagin.*

**John Wallace ivaðist ikki í at koma til Føroya at spæla, hóast hann hevur roynt mangt størri og meira hábærsligt høvi**

PRÁT
*Heri á Rógvi/*
*Finnur Justinussen*

Á hundrað ára degnum hevði Havnar Hornorkestur eisini megnað at fáa ein rættiliga stjørnuleikara til Føroya at spæla á konsertini.

53 ára gamli John Wallace er víðagitin fyri sítt spæl við serliga kornettini, og hann hevur ríka tónleikaliga fortíð aftanfyri seg, har hann hevur spælt við nógvum mætum tónleikarum, orkestrum og dirigentum. Millum annað hevur hann spælt í The London Symphony Orchestra, og hann hevur spælt kring allan heim.

Í løtuni er hann rektari á The Royal Scottish Academy of Music and Drama.

– Tað var Andras Olsen, sum eg havi undirvíst í London, ið spurdi meg, um eg ikki hevði hug at koma til Føroya at spæla, og tað vildi eg ógvuliga fegin, sigur John Wallace, tá vit hittu hann beint eftir konsertina leygardagin.

Andras Olsen hevur nomið sær útbúgving á Royal Academy of Music í London. Andras er sonur Kára Olsen, formann fyri Havnar Hornorkestur.

– Eg byrjaði sjálvur í einum orkestri sum hesum, og eg haldi, at hetta er gott og stórt høvi at koma til Føroya. Eg nýtti tað eisini at spæla saman við orkestrinum, sigur John Wallace.

Við sær til Føroya hevði hann eisini konu sína. Tey bæði fóru av landinum aftur mánadagin.

John Wallace hevði á vitjan síni eisini Master Class á Musikskúlan, og hann nýtti eisini høvi til at leggja tónleikarum lag á og geva góð ráð.

